## Hevur tú námsfrøðiliga útbúgving og ynskir at starvast á Eiði?



**Dámar tær at brúka náttúruna til spæl og menning?**

**Ynskir tú at arbeiða saman við dugnaligum starvsfelagum?**

**Kundi tú hugsa tær at havt ávirkan á títt arbeiði?**

**Vilt tú hava góða tíð til fyrireiking?**

**Hetta kanst tú fáa og nógv annað, um tú velur eitt starv á Eiði.**

### Korndalsgarður á Eiði søkir eftir

Einum námsfrøðingi at starvast í Korndalsgarði 30 tímar um vikuna á vøggustovu ella barnagarðsstovu. Møguleiki er fyri at fáa fulla tíð seinri. Vit ynskja ein námsfrøðing, ið hevur góð samstarvsevnir, ið er jaligur og kveikjandi fyri arbeiðsumhvørvið, og sum brennur fyri at geva børnum góðar upplivingar. Starvið verður at byrja 1. septembur 2025 ella skjótast gjørligt. **Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv**.

Møguleiki er fyri at síggja stovnin og møguleikarnar, og at møta leiðaranum og álitisfólkinum áðrenn tú søkir. Meira fæst at vita um starvið við at venda tær til leiðaran á tlf. 740410.

Løn sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Føroya pedagogfelag.

Vit gleða okkum at fáa eina umsókn frá tær áðrenn 7. august 2025 kl. 14.00. Umsókn, prógv v.m. verða at senda til korndalsgardur@eidi.fo

Faldari um stovnin er at finna her: https://www.eidi.fo/wp-content/uploads/2023/07/Korndalsgardur-FALDARAI-2023.pdf

Sambært §2 í barnaváttanarlógini hava vit skyldu til at fáa barnaváttan til vega, áðrenn umsøkjari verður settur í starv.